tíðindablaðið
Leysasøla: 6,- kr.
63. árg.
sosialurin
frælsi
javnaður
brøðralag
5 ferðir um vikuna
Nr. 189 ★ fríggjadagur 23. november 1990




## Daniel Sofus Poulsen, føroyskur oljuserfrøðingur:

# Olja einans 10 kilometrar frá føroyska markinum

Síða 3

*»Tá spurningurin um undirgrundina er loystur, kunnu vit átaka okkum fullan leiklut, tá kanningararbeiðið um oljuna byrjar, og ikki standa sum gapandi áskoðarar, meðan aðrir leika fyri fullum húsum – á føroyskum palli,« sigur Daniel Sofus Poulsen, sum hevur starvast sum oljuserfrøðingur kring allan knøttin síðan 1976*



## Jógvan við Keldu úr Fólkaflokkinum:

# RÝMIR

Jógvan við Keldu, fyrrverandi løgtingsmaður í Norðoyggjum fyri Fólkaflokkin, hevur meldað seg út úr Fólkaflokkinum. Hetta vilja keldur í Klaksvík vera við.

Spurningurin um viðurskifti Keldumansins við flokkin hava verið politiskt umrøðuevni síðani hann setti tvøran fótin fyri partamannin Olaf Olsen, landsstýrismanni í heilsumálum. Jógvan við Keldu hótti tá við at taka seg úr samgonguni, tók Olaf Olsen ikki arbeiðs-ætlanina og visitatións-nevndarætlanina aftur.

Tað gjørdi landsstýrismaðurin ikki, og úrslitið var hareftir: í brævi boðaði Jógvan við Keldu frá, at hann tók seg úr samgonguni.

Um tað er hetta ella eitthvørt, ið beinleiðis hevur samband við løgtingsvalið, er óvist. Sum kunnugt fall tann Jógvan við Keldu sum umdømisvaldur í Norðoyggjum til frama fyri tann eykavalda Birgir Danielsen í Suðurstreymi eftir fínteljingina.

Aðrar keldur vilja kortini vera við, at stigið hjá Jógvani við Keldu ikki er so avgjørt: hann hevur boðað frá, at hann ikki stillar upp aftur fyri Fólkaflokkin.

Tað eydnaðist ikki at fáa samband við Jógvan við Keldu, áðrenn blaðið fór til prentingar.

ówh



**Alt bendir á, at Jógvan við Keldu er rýmdur úr Fólkaflokkinum**

## Daniel Sofus Poulsen, føroyskur oljuserfrøðingur:

# Olja einans 10 kilometrar frá føroyska markinum

***»Tá spurningurin um undirgrundina er loystur, kunnu vit átaka okkum fullan leiklut, tá kanningararbeiðið um oljuna byrjar, og ikki standa sum gapandi áskoðarar, meðan aðrir leika fyri fullum húsum – á føroyskum palli,« sigur Daniel Sofus Poulsen, sum hevur starvast sum oljuserfrøðingur kring allan knøttin síðan 1976***

Hetland hevur ein stóran og umfatandi oljuídnað beint uttan fyri dyrnar.

Hvat hava teir fingið burturúr?

Teir hava fingið sera lítið burturúr. Tað einasta, ið kastar eitt sindur av sær, er tað, teir fáa fyri at umskipa olju í Sulom Voe.

Teirra lítla íkast í oljuídnaðin ta fyrstu tíðina gav teimum tilsvarandi lítið afturfyri. Kortini halda hetlendingar sjálvir, at teir kundu ikki verið oljuna fyri uttan í dag, nú ein svinnandi fiskaídnaður er veruleiki.

Tá hugsað verður um menningina í Vesturheiminum í dag, er veruleikin tann, at bretskur politikkur er at ganga uttan um Hetland og stýra øllum tiltøkum frá fastlandinum.

Eftir 20 ár eiga hetlendingar einki kanningarðella útgerðarskip, fyri ikki at nevna oljuboripall, ei heldur er nakað tílíkt skrásett har.

### Hava Føroyingar nakað at læra av hetlendingum?

Hetland verður stýrt av einum ráði. Vit hava løgting.

Okkara avgerðarrættur er meira umfatandi enn tann hjá hetlendingum. Okkara løgting skuldi fingið rættindini til undirgrundina upp á pláss, skjótast til ber.

Farnu seks árini hevur danska stjórnin gjøgnum D.G.U. gjørt geofysiska kortlegging av føroysku undirgrundini.

Hetta verður ein kærkomin og hentur biti hjá teimum stóru alheims oljufeløgunum, tá økið verður latið leyst (politiskt) til »Frontier Exploration«.

Fyrsti áhugin fyri Føroyum er longu veruleiki nú!

**OKTOBER 1990:**
**Olja fleyt úr eini keldu í øki 205, sum er einans 10 kilometrar frá føroyskum sjógvi.**

**ÚRSLIT:**
**Frá apríl og til endan av oktober 1991 verða borað fýra hol í øki 205. Umframt tey trý holini, sum longu eru ætlað at bora í øki 206.**

### Hvat eiga vit at gera?

Enn er ikki ov seint hjá Føroyum at sleppa sær upp í oljuídnaðin, tvørturímóti.

Støða okkara hevur onga tíð verið betri enn júst nú, orsakað av seinastu hendingunum.

Verandi støðan í persiska flógvanum, økti oljuprísurin saman við seinastu oljufundunum vestan fyri Hetland – sum longu nevnt – hava ført Føroyar uppaftur á tað støði, at vit eru kappingarførir viðvíkjandi kanningarøki, sæð við eygunum hjá stóru alheims oljufeløgunum, so sum eisini var støðan í sjeytiárunum.

Tey, ið kanska hava sæð tann einsamalla oljuboripallin við føroyska markið, meðan siglt varð til Scrabster í summar, kunnu hyggja at og undrast á teir tríggjar ella fýra boripallarnar, ið allir fara at standa og bora samstundis í 1991.

Vit noyðast nú at leggja ætlanir fyri framtíðina og fara undir neyðugu fyrireikingarnar.

Tá spurningurin um undirgrundina er loystur, kunnu vit átaka okkum fullan leiklut, tá kanningararbeiðið um oljuna byrjar, og ikki standa sum gapandi áskoðarar, meðan aðrir leika fyri fullum húsi – á føroyskum palli.

### Hvussu eftirfarandi er hetta?

Undirritaði hevur starvast sum serfrøðingur innan olju- og gasskanningar kring allan knøttin síðan 1976.

Eg eri ikki limur í nøkrum politiskum flokki, men vil fegin við hesum stubba leiða hug politikaranna og íbúgvanna á tann týdning, undirgrundarspurningurin hevur fyri hvønn einstakan okkara í dag.

Vit vita øll, hvussu støðan er í Føroyum í dag, men vit mugu huga um og fyrireika okkum til framtíðina.

**Daniel Sofus Poulsen**
**á Lygnesi**
**Søldarfjørður**



**Boripallar sum hesin verða kanska gerandissjón í føroyskum sjóøki innan langa tíð. Í hvussu er heldur føroysku oljuserfrøðingurin Daniel Sofus Poulsen, at tíð føroyinga at byrja oljuboringar ongantíð hevur verið betri enn nú. »Enn er ikki ov seint hjá Føroyum at sleppa sær upp í oljuídnaðin, tvørturímóti,« skrivar hann í hesi greinini.**




**Í oktober 1990 fleyt olja úr eini keldu í øki 205 (sjá ørv), sum er einans 10 kilometrar frá føroyskum sjóøki. Í apríl mánaði komandi verður byrjað at bora í hesum øki, umframt at longu eru borað trý hol í øki 206, við síðuna av 205.**